# Reglugerð fyri hýruvognsstøðir í Tórshavnar kommunu

**§ 1**

Støðin skal hava avgreiðslustað á fastari adressu í Tórshavnar kommunu. Fartelefon í bili verður ikki góðtikin sum avgreiðslustað.

**§ 2**

Hýruvognsnevndin skal hava navn og bústað hjá teimum, sum hava ábyrgdina av støðini.

**§ 3**

Støðin skal hava í minsta lagi 6 bilar í rakstri tá hon fer undir virki sítt og innan eitt ár skal talið verða 10, og má talið síðan ikki fara niður um 10. Annars verður góðkenningin afturtikin. Støðin fær eitt skoðbrá sum er 6 mánaðir, av avtaka støðina.

**§ 4**

Allir hýruvognar, sum eru knýttir at støðini, skulu hava hýruvongsloyvi, sum er útskrivað av Hýruvognsnevndini fyri Tórshavnar kommunu.

**§ 5**

Støðin skal hava bíleggingartelefon og skal verða telefonsamband millum støðina og allar tilmeldaðu bilarnar.

Tekniski útbúnaðurin skal vera av tílíkum slag, at lættliga og uttan drál slepst í samband við støðina og bilarnar.

**§ 6**

Minst ein støð skal hava vakt alt samdøgrið - t.v.s. at fólk skal vera í avgreiðsluni og bilar í rakstri alt samdøgrið.

Støðirnar skulu hava eina vaktarskipan, sum hýruvognsnevndin skal góðkenna eins og nevndin eisini skal góðkenna broytingar í vaktarskipan.

**§ 7**

Brot á reglugerðina kann føra við sær at hýruvognsnevndin tekur góðkenningina aftru - og fær støðleiðslan tá 6 mánaðar skoðbrá at avtaka støðina.

**§ 8**

Hýruvognsnevndin gevur einans hýruvognsloyvi til umsøkjarar, sum hava váttan fyri at teir koma at koyra frá støð og verður loyvið tikið aftur um teir halda uppat at koyra frá støð.

Undantiknir eru tó teir hýruvognskoyrarar, sum ikki koyrdu frá støð tá fyrstu hýruvognsloyvini vóru útskrivað í 1988.

**§ 9**

Reglugerðin er góðkend í hýruvognsnevndini 18. mai 1994 og fær gildi 1. juni 1994.

**Hýruvognsnevndin fyri Tórshavnar kommunu**